# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Ingun Joensen:

## 25 ára starvsdag á Ellisheiminum



*Ingun Joensen fekk gávu og blómuheilsan frá borgarstjóranum Heðini Mortensen*

Mánadagin var ein hugnaløta á Ellisheiminum í Havn í samband við at Ingun Joensen hevur arbeitt á stovninum í 25 ár. Ingun er ættað úr Sandavági og búsitandi í Havn.

Til hugnaløtuna vóru nógv fólk savnaði, bæði búfólk, starvsfólk, vinir og familja hjá Ingun og umboð fyri býráðið saman við borgarstjóranum Heðini Mortensen.

Tey sum hildu talu vóru Randi Kjærbæk og Lisbeth Danielsen, starvsfólk, og Ida Sørensen fyristøðukvinna á Ellisheiminum.

Borgarstjórin segði m.a. í talu síni fyri Ingun: Øll hesi árini hevur tú trúføst og áhaldandi havt títt fasta pláss í køkinum - tilsamans munnu tað vera ikki so fá tons av eplum tú hevur flust og óteljandi koppar og tallerkar, sum tú hevur vaskað upp.

Tú ber orð fyri at vera nærløgd og at gera títt arbeiði til lítar. Men tað sum serliga eykennir teg er, at tú ert so góð við títt arbeiðspláss. Á Ellisheiminum eru tey eisini ógvuliga góð við teg, og sakna teg, tá tú ikki ert til arbeiðis. Tú fylgir væl við í øllum sum fyri ferst á Ellisheiminum.

Mær er sagt frá, at tað ofta gongur lívliga fyri seg í køkinum, tí at skemta dugir tú eisini.

Eitt arbeiðspláss, har hjartarúm er, har kenslur og fjølbroytni sleppa at liva, er eitt ríkt arbeiðspláss. Tí vil eg eisini nýta høvi at ynskja Ellisheiminum til lukku við hesum degi, og ynskja at hetta framhaldandi kann vera eitt gott arbeiðspláss, har fólk trívast og mennast, segði Heðin Mortensen.

Sosialurin

# Jóhanna M. Petersen 90 ár

Týsdagin 22. august verður Jóhanna Petersen í Rituvík 90 ár.

Jóhanna er fødd í Saltnesi og búði har hjá foreldrum sínum saman við sínum 6 systkjum til hon var 12 ára gomul, tá fór hon til ommu sína, sum búði á Tippinum í Rituvík. Meiningin var, at hon bert skuldi vera har eina stutta tíð fyri at hjálpa ommu síni, men tíðin leið, og hon bleiv verandi í Rituvík.

25. november í 1937 giftist hon, 21 ára gomul, við Joen Jacob Petersen, sum var úr Rituvík.

Tey giftust inn á Tippinum, har hon búði frammanundan, og búðu so har saman við ommu og mammubeiggja Jóhonnu. Joen Jacob og Jóhanna fingu 9 børn saman; 3 gentur og 6 dreingir, harav 8 av teimum eru á lívi í dag.

Tey, sum kenna J óhonnu vita, at hon hevur verið ein avbera arbeiðssom kvinna, sum avgjørt ikki hevur ligið á latu síðu, tvørturímóti. Hóast hon hevur verið lamin, síðan hon var fødd, og hevur máa livað við pínu, serliga í mjødnini, dagliga, so hevur hon stríðst, og sum sagt borið 9 børn. Joen Jacob var sjómaður, og meðan hann tað nógva av tíðini, hevur verið burtur, hevur hon sjálv verið heima og røkt børn og hús til lítar.

Eftir at hava verið giftur við Jóhonnu í 59 ár, andaðist Joen Jacob í 1996. Sostatt náddu tey ikki diamantbrúdleypinum.

Jóhanna hevur verið serliga røsk at binda, og ikki er tal á hvussu nógvar hosur, skóleistar, skipstroyggjur, undirtroyggjur osfr. hon hevur bundið tilsamans millum ár og dag. Henni dámar enn væl at sita við stokkum millum hendurnar og binda hosur. Jóhanna hevur eisini gjøgnum árini bakað mongdir av góðum pannukøkum og inntil fyri stuttum hevur hon knoðað síni egnu breyð.

Jóhanna er sera fitt og blíð av lyndi, og mangar góðar løtur hava vit havt yviri á Tippinum.

Tá man er komin inn á vitjan, hevur bert gingið ein lítil løta, so hevur ein stakkur av góðum, nýbakaðum pannukøkum staðið á borðinum.

Nú Jóhanna hevur nátt henda høga aldur, sær ættartalva hennara soleiðis út: 9 børn, 22 ommubørn, 33 langommubørn og 6 oldurommubørn.

Góða omma og langomma, takk fyri alt tú ert fyri okkum. Hjartaliga tillukku við degnum og Guds ríku signing.

**Ynskja vit á Skipanesi**

# Óla Hans Olsen 50 ár

Í gjár, sunnudagin 20. august, fylti Óla Hans Olsen í Havn 50 ár. Sama dag fylti dóttur hansara, Jona, fjúrtan ár.

Óla Hans var føddur í Havn, og her búði hann, inntil hann saman við mammuni og tveimum systkjum flutti til Skálavíkar, har mannan giftist Hermani Petersen. Tá var hann seks ára gamalur.

Foreldrini hjá Óla Hans vóru Jona fødd Hansen og ættað úr Æðuvík, og Kartni Olsen úr Havn. Omman og abbin á móður síðuni vóru Sunneva og Óla Hans Hansen. Tey búðu fyrst í Æðuvík og seinni í eysturbýnum í Havn. Á faðir síðuni vóru omman og abbin Jóhanna og Palli Olsen ella Palli á Lava, sum hann varð nevndur.

Pápin búði nógvu tey seinastu árini í Keypmannahavn, har hann doyði miðskeiðis í áttati árunum.

Systkini hjá Óla Hans eru Palli (1957) í Skálavík, Katrin (1958) í Skopun, Sunneva (1963) í Kollafirði og Jóan Petur (1967) í Skálavík.



Eftir at hann sum fjúrtan ára gamal var farin úr skúlanum, var Óla Hans sjómaður í tíggju ár. Hann var í tvey ár á Flemmish Cap við Kvikki, sum Palli Mikkelsen, Palli í Gøtu, í Klaksvík, førdi, hann var onkrar ísfiskatúrar við Columbusi, sum Jákup Andreas Vang ella Jákup Andreas í Kálvhúsinum á Glyvrum førdi, og so var hann í tvey ár við Reynsatindi á garnaveiðu í Grønlandi. Skipari var Dánial Pauli Nielsen, ættaður úr Sandavági og búsitandi í Havn.

Síðsta skipið, sum Óla Hans sigldi við, var vaktar og bjargingarskipið Tjaldrið. Har var hann dekkari við í fýra ár.

Eftir at Óla Hans hevði verið á ítróttarskúla í Ollerup í eitt ár og ætlaði at halda fram á tí leiðini, gjørdist hann álvarsliga sjúkur í høvdinum. Hann var á Ríkissjúkrahúsinum og Landssjúkrahúsinum, og hann kom fyri seg aftur.

Síðani 1986 hevur Óla Hans arbeitt á Toll og Skattstovu Føroya. Á sumri í 2004 og aftur á sumri í 2005 var hann í nakrar mánaðir í Thule og arbeiddi.

Óla Hans giftist í 1991 við Charlottu á Váli, sum er ættað úr Klaksvík. Tey búgva í Svanga, har tey eiga hugnaligt heim, og tey eiga tvey børn. Jona (1992) og Ólavur (1994).

Óla Hansi dámar væl sang og tónleik, og hann hevur altíð verið ógvuliga áhugaður í fótbólti. Frá fyrstu barnaárunum hevur hann hildið við B36, og so hevur tað verið B71, sum hann eisini spældi við inntil hann gjørdist sjúkur. Tá var besta B71 liðið í 3. deild.

Føðingardagin hildu Óla Hans og dótturin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, har nógv fólk vitjaði inn á gólvið seinnapartin sunnudagin.

**J**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir